# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Skúlin skal ikki hava vánaligar lærarar. Teir eiga at fáa sekkin*

*Anders Bondø Christensen, form. í danska lærarafelagnum*

# Brúka børn í bumbuálopum



**Bumbumenninir høvdu tvey børn á baksetrinum í bilinum fyri at sleppa inn um girðingina. So sprongdu teir bilin við børnunum í luftina**

Uppreistrarmenninir í Irak aftra seg ikki við at brúka børn fyri at røkka sínum málum, sigur amerikanski generalurin Michael Barbero. Á tíðindafundi í verjumálaráðnum Pentagon greiddi hann frá einum tilburði.

- Trygdarmenn í Bagdad steðgaðu einum bili við tveimum monnum, men tá trygdarmenninir sóu, at tvey børn vóru á baksetrinum, lótu teir bilin sleppa ígjøgnum girðingina. Teir báðir menninir settu bilin nakað innan fyri girðingina, men so fótu teir úr bilinum og kvikaðu sær burtur. Í somu løtu fór bilurin í luftina - við teimum báðum børnunum á baksetrinum.

Michael Barbero, generalur, segði, hetta var fyrstu ferð, at hann hevði hoyrt, at uppreistrarmenn hava brúkt børn fyri at sleppa ígjøgnum girðingarnar í Bagdad. Hann helt, at hetta kann vera ein avleiðing av, at amerikanskir og irakskir hermenn hava hert eftirlitið í býnum, og at uppreistrarmenninir tí hava valt at ganga nýggjar leiðir.

Tilburðurin, sum Michael Barbero, generalur, greiddi frá, var seinasta sunnudag í Sadr-býarpartinum. Tað er ikki greitt, um tey bæði børnini høvdu nakað tilknýti til teir báðar bumbumenninar.

# Stórátak ímóti mafiuni

**Seinasta samdøgrið hevur italska løgreglan tikið 171 fólk og sett tey í varðhald**

Í fleiri førum hevur løgreglan tikið heil húski, tí sambært fjølmiðlunum hevur løgreglan avdúkað, at í fleiri førum hava foreldur og børn samstarvað um at selja rúsevni.

- Tað er eingin ivi um, at kvinnur hava fingið ein størri leiklut í virkseminum hjá mafiuni, og at í fleiri førum eru tað kvinnur, sum standa fyri rúsevnasøluni í summum økjum. Harafturat hava vit dømi um, at kvinnur standa fyri flutninginum, sigur talsmaðurin hjá løgregluni í Napoli, Gaetano Maruccia.

Hann heldur tó, at fleiri av kvinnunum eru farnar upp í virksemið hjá mafiuni, tí teirra menn eru tiknir og sita í fongsli.

Tað stóra átakið hjá italsku løgregluni hesaferð var vent ímóti mafiafelagsskapinum Camorra, sum hevur staðið fyri øllum mafiavirkseminum í Napoli tey seinastu tíggju árini. Umleið 1.000 løgreglufólk vóru við í átakinum, og fleiri týðandi mafialimir vórðu tiknir og skuldsettir út frá upplýsingum, sum løgreglan hevur fingið frá einum fyrrverandi mafialeiðara, sum hevur samstarvað við løgregluna tey seinastu árini.



*Alt fleiri kvinnur eru uppi í tí ólógliga virkseminum hjá italsku mafiuni.*

## STUTT SAGT

### Vil hava pengarnar nú

Fyri nøkrum døgum síðani samdust Norðurkorea, Suðurkorea, Kina, Japan, Russland og USA um treytirnar, fyri at Norðurkorea skal gevast við sínum kjarnorkuætlanum. Men í gjár kom kuril á tráðin. Ein partur av semjuni er, at Norðurkorea skal fáa fatur á teimum pengunum, sum landið eigur uttanlands, men sum altjóða samfelagið legði hald á fyri at noyða Norðurkorea til samráðingarborðið. Í gjár vildi Norðurkorea hava vissu fyri, at landið fær pengarnar nú, men ta vissuna kundi landið ikki fáa. USA hevur lovað at lata norðurkoreanar fáa 25 mió. dollarar, sum standa í einum banka í Macau, men í gjár kundu myndugleikarnir har ikki vátta, at pengarnir eru tøkir.

### Andstøðufólk hvørva

Mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch vil vera við, at løgreglan og herurin í Teilandi hava tikið fleiri av teimum muslimsku leiðarunum har suðuri í landinum. Endamálið við handtøkunum er at noyða muslimarnar at gevast við mótstøðuni ímóti myndugleikunum. Human Rights Watch skrivar í einari nýggjari frágreiðing um 22 fólk, sum eru horvin, men sum eftir øllum at døma sita í varðhaldi hjá trygdardeildunum. Í øllum teimum 22 førunum er talan um politiskar andstøðingar, sigur HRW.

### Kann enda í rættinum

Tað er minni enn so vist, at franski forsetin, Jacques Chirac, sleppur at njóta tíðina, tá hann leggur frá sær um tveir mánaðir. Fronsk bløð skriva, at uttan fyri forsetaborgina standa fleiri sakførarar og bíða eftir, at forsetin kemur út haðani fyri seinastu ferð, tí tá kunnu teir stevna honum. Fyri tólv árum síðani varð Jacques Chirac skuldsettur fyri grovt svik, sum hann hevði gjørt seg sekan í sum borgarstjóri í París, men tá hann bleiv valdur til forseta, mátti málið sleppast, tí forsetin kann ikki dragast fyri rættin. Kanska hevði Chirac væntað, at sakførararnir fóru at lata málið liggja aftan á so mong ár, men tað er ikki líkt til, at hann sleppur so lætt.